

# Harmasongur um fíggjarligum

**FRÁ OKTOBER 2008 TIL JANUAR 2009 FÓRU TÚSUNDTALS ÍSLENDINGAR Á GØTUNA VIÐ GRÝTUM OG SLEIVUM OG KRAVDU, AT STJÓRNIN HJÁ GEIR HAARDE LEGÐI FRÁ SÆR, TÍ HON ONKI HEVÐI GJØRT AT FYRIBYRGJA FÍGGJARLIGA SKRÆDLINUM Í ÍSLANDI. NORÐURLENDSKI VIRÐISLØNARVINNARIN Í BÓKMENTUM, EINAR MÁR GUÐMUNDSSON, GAV FYRI JÓL Í FJØR ÚT BÓK, HAR HANN TEKUR SAMAN UM ORSØKIRNAR TIL SKRÆDLIÐ OG GEVUR TEIMUM, IÐ HØVDU ÁBYRGDINA AV TÍ, AV GROVFÍLUNI**



FÍGGJARKREPPA

Uni Arge
uni@sosialurin.fo

Tá íslendsku bankarnir fóru á húsagang í oktober 2008, og íslendska ríkið mátti yvirtaka teirra ovurstóru skuld, skrivaði Ísland seg í søguna sum eitt av teimum londunum í heiminum, ið fíggjarkreppan rakti harðast. Á sjónvarpsstøðum sum BBC og CNN varð staðfest, at íslendska ríkið í roynd og veru var farið á húsagang, og við eitt var umdømi landsins illa skatt og tann fyrr so sterka íslendska sjálvkenslan skakað.

Undir kreppuni í Føroyum fyrst í nítiárunum boygdi mangur føroyingur høvdið av skomm, tá serliga danskir fjølmiðlar útpensladu, hvussu vill ovurnýtsla í áttatiárunum hevði rent landið um koll. Somu viðferð fáa íslendingar nú, ikki bara í donskum fjølmiðlum, men øllum heimsins fjølmiðlum, og tann niðrandi umrøðan særir íslendingar so djúpt, at teir nú krevja, at politikarar og ríkmenn bøta fyri húsagangin.

Einar Már Guðmundsson telist millum tey mongu, sum hava talað harðliga at dansinum, sum íslendsku útrásarvíkingarnar í bankum og atknýttum feløgum dansaðu á ótamda kapitalistiska marknaðinum. Útrásarvíkingarnir vóru korruptir og sviku fólkið, men nú eru teir langt av landi skotnir og lata sakleys fólk sita eftir við rokningini, sigur hann í bersøgnu kjakbók síni um skrædlið í Íslandi.

Bókin kallast á donskum "Hvidbogen - Krisen på Island" og er 190 blaðsíður til støddar. Ov nógv er ikki sagt, at hendan bókin er ákæruritið hjá einum av fremstu rithøvundunum í Íslandi mótvegis tí vitloysi, sum rendi landið á húsagang, og sum fekk fólkið at reisa seg, fara á gøturnar og krevja eina stjórn setta frá, sum ikki hevði hegni at steðga samvitskuleysu atferðini hjá útrásarvíkingunum.

"Har funnust ongar lógir ella reglur at forða fyri tí, sum fíggjarfúrstarnir gjørdu. Landsins politikarar snorksvóvu, yptu bara øksl og skálaðu saman við fíggjarfúrstunum, ja, fingu enntá gron, um teir ikki vórðu bodnir við í teirra Hollywoodkendu veitslur," skrivar Einar Már Guðmundsson og fegnast um, at tað eydnaðist honum og mongum túsund øðrum íslendingum at fáa stjórnina hjá Geir Haarde rikna frá valdinum í januar 2009.

## Marknaðurin gjørdist Guð

Tónin í bókini er beiskur. Einar Már Guðmundsson er óður um, at so galið kundi gangast, og á einum av fyrstu síðunum grundar hann yvir, um Karl Marx kanska hevði svarið longu fyri 150 árum síðani í høvuðsverki sínum, "Das Kapital." Fáur hevur lisið alt verkið, tí 2. bind er so torskilt við nógvari fløktari støddfrøði, men í 3. bindi umrøður Karl Marx ta støðu, sum uppstóð í Íslandi og manga aðrastaðni undan fíggjarkreppuni.

Karl Marx skrivar um poetiskt ríkidømi og fiktivan kapital, har ongin virðisframleiðsla er aftan fyri vinningin, og virðisleys pappír bara flyta runt millum fólk. Eina tílíka óhepna ringrás settu íslendsku kapitalistarnir í gongd, og meðan alt gekk sum eftir ánni, vórðu teir hildnir at vera bæði raskir og dugnaligir. Í bløðum, teir sjálvir áttu, vórðu teir umrøddir sum hálvgudar, og fólk fagnaðu teimum sum hetjur.

"Hesir menninir keyptu seg inn í feløg, fingu meirilutan í teimum, stovnaðu nýggj feløg, seldu hvørjum øðrum tey og strikaðu so virðini í teimum gomlu feløgunum, virðini hjá partaeigarunum. Hetta var ringrásin. Soleiðis gekst nógvum virðismiklum feløgum. Aftaná vóru teir aftur at síggja í bløðunum, høvdu keypt sær skíðbreytir í Alpunum, marglætisíbúðir á Manhattan og stuttleikabátar í Florida," skrivar Einar Már Guðmundsson.

> Har funnust ongar lógir ella reglur at forða fyri tí, sum fíggjarfúrstarnir gjørdu. Landsins politikarar snorksvóvu, yptu bara øksl og skálaðu saman við fíggjarfúrstunum

Hann heldur lítið um hálovandi tosið hjá sonevndum liberalistum um, at frælsi marknaðurin er svarið upp á alt. Alt tosið um tann fría marknaðin hevði undan fíggjarkreppuni átrúnaðarligan dám, og hvørja ferð onkur setti spurnartekn við gongdina, var svarið bara, at hatta reguleraði marknaðurin. Marknaðurin gjørdist Guð. Ósjónliga hondin hjá marknaðinum gjørdist Guðs vilji, og tí sluppu kapitalistarnir at spæla sær, sum teir vildu.

## Millum heimsins ríkastu

Meðan villskapurin var størstur, og lønirnar hjá útrásarvíkingunum fóru til himmals, tók seg upp ein heilt nýggj stætt í Íslandi. Summi gjørdust ovurrík og mannaðu nýggju yvirstættina. Meðalstættin fór at minna um biddarar, og undirstættin var óbrúkilig. Øll vanlig mát sprongdust. Vanlig størv sum lærarayrkið vórðu hildin at vera útssalig. Ongin koyrdi í bussi. Øll koyrdu í egnum bili, hóast teir vóru skuldarbundnir frá hjólunum upp á takið.

Bankastjórarnir í teimum privatiseraðu bankunum flottaðu sær sum greivar. Teir hildu seg fremja stórverk og góvu sær sjálvum mánaðarlønir, ið svaraðu til eina Nobel-virðisløn. Varð funnist at teimum, fóru teir at tosa um øvund og hóttu við at rýma av landinum. Samstundis vístu teir á, at váðin var teirra, og tí máttu teir lønast væl. Einar Már Guðmundsson skrivar: